# Rás 2 flytir til Søldarfirðar

**Rás 2 hevur keypt bygning í Søldarfirði, og har skal høvuðssætið hjá útvarpsrásini verða framyvir. Stjórin á Rás 2 roknar við, at sendast kann úr Søldafirði fyri jól**

ÚTVARP
*Eyðun Klakstein*

Rás 2 fer at flyta úr høvuðsstaðnum.

Hetta er greitt, eftir at Rás 2 hevur keypt bygning í Søldarfirði, har høvuðssætið hjá útvarpsrásini skal vera framyvir.

Higartil hevur Rás 2 hildið til í Havnini, men seinni í ár verður nýggi bygningurin í Søldarfirði tikin í nýtslu.

– Vit skulu fyrst gera bygningin kláran at hýsa eini útvarpsstøð, men tað arbeiðið er byrjað, og vit vóna, at alt verður klárt fyri jól, sigur Petur Jacobsen, stjóri á Rás 2.

Tøkniliga útgerðin verður flutt í einum á náttartíð, og tí verður einki órógv á sendingunum hjá Rás 2.

**Eisini studio í Havn**

Rás 2 er eina av trimum útvarpsrásum, men hon verður tann fyrsta, sum fer út um Havnina við síni høvuðsskrivstovu.

– Vit hava nógv samband við fólk og virki uttanfyri Havnina, og tí fer tað neyvan at órógva tað stóra, at vit vera í Søldarfirði. Vit liggja rímiliga sentralt hóast alt, sigur Petur Jacobsen.

Leigusáttmálin í verandi bygningi í Havn gongur út 1. januar næsta ár.

Rás 2 fer tó ikki at sleppa høvuðsstaðnum upp á fjall, tí útvarpsstøðin ætlar sær framhaldandi at hava studio í Havn, og harafturat hava teir eisini studio í Klaksvík.

# Heðin lurtaði eftir Bush og Annan



*Heðin Mortensen á ST-høvuðsborgini í New York, har hann umboðar føroyingar á aðalfundinum hjá Sameindu Tjóða*

**Heðin Mortensen sat undir hvørjum orði, tá ið ST-aðalfundurin var settur í New York týsdagin. Trygdin er í hásæti, og løgreglumenn eru at síggja allastaðni í býnum**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*

Løgtingsmaðurin Heðin Mortensen er í hesum døgum á aðalfundi hjá Sameindu Tjóða í New York.

Føroyingar hava á hvørjum ári eitt umboð við í donsku sendinevndini á fundinum, og fyrra partin av aðalfundinum verður tað Heðin Mortensen, sum skal umboða føroyingar á ST-høvuðsborgini.

Hetta er 58. aðalfundurin hjá ST, og tá aðalfundurin verður sett, eru røðararnir nakrir av týdningarmestu monnunum í heimssamfelagnum.

**Annan og Bush**

Týsdagin var Kofi Annan, aðalskrivari í ST, fyrsti maður á røðarapallinum, og hann tosaði millum annað um, at ST var á einum vegamóti.

Amerikanski forsetin, George W. Bush, tosaði eisini fyri teimum umleið 3000 fólkunum, sum vóru savnað.

– Tað var sera áhugavert at lýða á og eygleiða so mætar menn, og sum væntað var nógv tosað um støðuna í Irak, sigur Heðin Mortensen.

**Strangt eftirlit**

Seinastu árini hevur yvirgangur verið í miðdeplinum, og tí verður ansað væl eftir, at einki hendir teimum, sum eru til ST-aðalfundin

– Trygdin er sum vera man sera strong til ein slíkan ST-aðalfund bæði innan og uttanfyri bygningin. Eftirlitið er strangari enn í nakrari floghavn. Løgreglan er at síggja allastaðni í býnum, sigur Heðin Mortensen.

Føroyski løgtingsmaðurin býr á einum gistingarhúsi á East 34th Street, og av 35. hædd er útsýnið yvir býin óføra gott.

Tað er danska sendistovan í New York, sum samskipar arbeiðið hjá donsku sendinevndini á aðalfundinum.


# Móttøka

*Bjóðað verður til móttøku í hølunum hjá Starvsmannafelagnum í J. H. Schrøtersgøtu 9 í sambandi við stjóraskifti í P/F Sofus M. Jakobsen.*

*Tað hevði glett okkum at sæð viðskiftafólk, samstarvsfelagar, vinir og kenningar.*

*Móttøkan verður fríggjadagin 26. september frá kl. 15–17.*

**Pf. Sofus M. Jakobsen**
**Ráðgevandi verkfrøðingar F.R.I.**


# Nýtt ESAB-umboð

Føroya Gassøla hevur yvirtikið umboðið upp á ESAB í Føroyum.

Poul Poulsen, sum hevur havt umboðið, fór brádliga herfyri.

– Poul hevur í nógv ár røkt hetta umboð sera væl og vilja vit á Føroya Gassølu gera okkara besta fyri at halda á fram við somu góðu tænastu, sum Poul altíð gav, og vit vilja gera okkara besta fyri, at allir teir kundar, sum keyptu teirra vørur frá Poul, koma at føla seg líka væl komnar hjá okkum sum hjá Poul Poulsen, sigur Føroya Gassøla í tíðindaskrivi.

Føroya Gassøla selir mest sum øll sløg av gassi og nú eisini allar tær vørur sum ESAB umboðar – millum annað elektrodur, sveisitráð, sveisitól og eykalutir.



# Ognartøkan forðar vegagerð Borðoyarmegin

**Týsdagin sendi pf Norðoyatunnilin út eitt tíðindaskriv, har boðað varð frá, at vegagerðin í sambandi við tunnilin Leirvíkarmegin, nú er farið í gongd. Í sama tíðindaskrivi verður somuleiðis sagt, at trupulleikar við ognartøkuni Klaksvíkarmegin føra við sær, at vegagerðin Borðoyarmegin í fyrsta lagi kann byrja 6. januar 2004**

NORÐOYATUNNILIN
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Steinbjørn Jacobsen fegnast fyrst og fremst um, at arbeiðið nú er farið í gongd, men hann harmast um, at tað ikki ber til at fara fyrr í gongd Borðoyarmegin, tí tað fer at darva fleiri verkætlanum, sum Klaksvíkar kommuna hevur í umbúnað at fara í holt við.

– Grótið frá tunlinum skal nýtast í fleiri verkætlanum, men tað ber ikki til at byrja upp á tær, so longi sum vegagerðin okkara megin ikki fer í gongd, sigur borgarstjórin, sum hevur hug at vera eitt sindur illfýsin um ognartøkuna og handfaringina av tí málinum.

Tað er ongin loyna, at tá tað eru yvir 100 eigarar tvørtur um eitt lendi, sum skal ognartakast, so kann tað taka sína tíð.

– Men hetta vistu vit øll áðrenn, sigur Steinbjørn og setur spurnartekin við, um tað sostatt bert mundi vera pf Norðoyatunnilin, sum ikki var greitt yvir hetta.

Men tey, sum vóru á kunnandi fundi um Norðoyatunnilin fyrr í ár, minnast flest øll, at ein av eigarunum á hesum øki, reisti seg upp og nam nevniliga við hendan spurningin um ognartøkuna tvørtur um Gerðabø.

Tá lat tað ikki til á umboðunum fyri Norðoyatunlinum, sum um at tey sóu hetta sum nakran stóran trupulleika. Men í áðurnevnda tíðindaskrivi kemur fram, at nettupp orsakað av ognartøkuni kann arbeiðið Borðoyarmegin ikki fara í gongd fyrr enn eftir ársskiftið.

**Seinkar øðrum verkætlanum**

Steinbjørn Jacobsen sigur eisini, at tað at arbeiðið Borðoyarmegin ikki fer í gongd enn, seinkar samstundir øðrum verkætlanum, sum Klaksvíkar kommuna er farin í holt við, sum liður í at fyrireika seg til stóru broytingina, tá tað verður koyrandi millum Borðoynna og meginlandið.

Hann nevnir til dømis góðshavnina í Ánunum, har Klaksvíkar kommuna hevur tikið av tilboðnum frá J og K Petersen um at gera arbeiðið liðugt. Har skal ymiskt gerast, og tørvur er á gróti frá tunlinum, men tað arbeiðið kann sostatt ikki fara í gongd enn.

– Tað er harmiligt, at aðrar verkætlanir ikki kunnu fara í gongd, orsaka av, at tað ikki er rætt framfarið í ognartøkunum í sambandi við undirsjóvartunnilin, sigur Steinbjørn Jacobsen. Hann sigur, at hann hevur fleiri ferðir gjørt vart við, at tað fór at taka langa tíð, men kortini er ognartøkan ikki byrjað enn.

Ein onnur stór verkætlan, sum fer í gongd í kjalarvørrinum av undirsjóvartunlinum, er miðbýurin í Klaksvík. Ætlanin er at fylla alt økið frá sandinum, har sum hann er í dag, og út til bátabrúgvarnar við gróti frá tunlinum.

Men hesi mugu sostatt bíða við at fara í gongd, inntil arbeiðið upp á tunnilin og vegagerðina Borðoyarmegin eru farin í gongd.

*Ognartøkan av lendunum í Klaksvík í sambandi við Norðoyatunnilin eru ikki farnar í gongd enn, men sambært tíðindaskrivi frá felagnum, so fara tær í gongd eftir 6. oktober*




**Harmiligt**

Dávur Reinert Hansen, stjóri í Norðoyatunlinum, sigur, at tey hava ásannað, at tað ikki er nemt at samráðast við yvir 100 eigarar í senn. Og hann sigur, at tískil hava tey sent út eitt semjuskriv um endurgjald til flestu eigararnar við freist tann 6. oktober, samstundis sum ognartøkan verður fyrireikað. Og kærutíðin er tríggjar mánaðir eftir freistina.

Dávur sigur, at tey harmast um, at aðrar verkætlanir ikki kunnu fara í gongd, men hann leggur dent á, at tey noyðast at fylgja teimum reglum, sum eru og liva eftir teimum.

– Vit vildu ynskt, at vit kundu farið í gongd samstundis báðumegin, men tað ber so ikki til, sum er. Men ognartøkan fer í gongd eftir 6. oktober, og so byrjar arbeiðið Borðoyarmegin eftir ársskiftið, sigur hann.

Stjórin í pf Norðoyatunlinum hevur sostatt góðar vónir um, at arbeiðið Borðoyarmegin fer í gongd stutt eftir ársskiftið. Hann sigur, at eftir sum hann hevur skilt, so verða møguligar kærur viðgjørdar í kærufreistini, og tískil dugir hann ikki at síggja nakað í vegin fyri, at alt ikki skuldi verið tilreiðar tann 6. januar 2004.

– Og so er tað veðrið sjálvandi. Januar mánaði kann vera keðiligur, tað vita vit øll, so um tað kann sjálvandi henda, at veðrið fer at hava sína ávirkan á júst dagfestingina fyri, nær arbeiðið fer í gongd, sigur Dávur Reinert Hansen, stjóri í pf Norðoyatunnilin.

# Verja okkara rætt

**Formaðurin í hagastýrinum fyri Uppsalahagan í Klaksvík, Jóhan Joensen, sigur, at eigararnir bert verja teirra rætt í málinum viðvíkjandi ognartøkuni av lendinum. Hann sigur eisini, at hetta málið ikki er so einfalt, sum tað kann tykjast at vera**

NORÐOYATUNNILIN
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Jóhan Joensen, formaður í hagastýrinum í Uppsalahaganum, sigur, at eigararnir og stýrið vilja sjálvandi verja teirra rætt sum ognarir viðvíkjandi ognartøkuni í sambandi við Norðoyatunnilin*

**Klaksvík:**
Málið viðvíkjandi ognartøku í sambandi við Norðoyatunnilin dregur út. Í tíðindaskrivinum frá Pf Norðoyatunnilin stendur, at tey hava spurt seg fyri hjá hagastýrinum í Uppsalahaganum, har tunnilsmunnin ætlandi verður, um tey kunnu sleppa inn á økið at gera forkanningarnar, hóast ongin semja um keypella ognartøku av lendinum fyriliggur. Hetta hevur hagastýrið noktað teimum. Jóhan Joensen, formaður í stýrinum, sigur, at hagastýrið umboðar allar eigararnar og má rætta seg eftir teirra ynski.

Hann váttar somuleiðis, at prísurin fyri lendini er ikki nøktandi. Norðoyatunnilin hevur bjóðað ein prís áljóðandi millum 12 og 25 krónur fyri fermeturin. Og tað halda eigararnir er ov lítið. Men spurningurin er í veruleikanum um, hvørja nyttu tað ger, at teir nokta. Tí sambært tíðindaskrivinum fer ognartøkan í gongd eftir 6. oktober. Og tá hava eigararnir ikki so nógv at skula sagt.

– Hetta er eftir mínari meting bert ein útsetan av byrjanini av arbeiðinum, heldur enn nakað annað. Men vit vilja sjálvandi verja okkara rætt í hesum málinum, tí vit standa jú sum eigarar, sigur hann.

Sigast skal tó, at júst tað lendið, sum Norðoyatunnilin hevur spurt seg fyri um, er kongsjørð, so hann persónliga dugir ikki at síggja nakað í vegin við, at Norðoyatunnilin fór inn og gjørdi tað forkanningararbeiðið, sum skal til, áðrenn tunnilsgerðin sjálv fer í gongd.

– Eigararnir blanda tingini saman her, haldi eg. Men stýrið umboðar jú teir, og vit rætta okkum eftir meirilutanum, sigur Jóhan, sum heldur, at um Norðoyatunnilin kanska hevði boðið ein meira sámuligan prís fyri lendini, so hevði ognartøkan langt síðani verið farin í gongd.

**Løgin mannagongd**

Jóhan fílist eisini á mannagongdina hjá Norðoyatunlinum í sambandi við hetta. Hann sigur, at teir sum eigarar hava bert sæð og hoyrt í fjølmiðlunum um ætlaninar hjá Pf Norðoyatunlinum. Og hann heldur tað vera sera løgið, at eigararnir ikki hava fingið greitt at vita fyri langari tíð síðani, júst hvørjar ætlanir lógu fyri framman.

– Um vit bara til dømis høvdu fingið eitt bræv, har alt varð nágreiniliga frágreitt, so kann tað hugsast, at alt hevði verið munandi léttari. Nú eru eigarar í staðin vorðnir uppaftur tvørari orsakað av væntandi kunnan um málið, sigur Jóhan Joensen.

Jóhan er sannførdur um, at Pf Norðoyatunnilin hevur undirmett tað, sum tey eru farin í holt við í Klaksvík, og tí er støðan, sum hon er, í dag.

Dávur Reinert Hansen sigur aðrastaðni í blaðnum í dag, at Norðoyatunnilin hevur ásannað trupulleikan við øllum eigarunum, og tíski lhava tey sent út semjunarskriv, tí tað verður ikki mett at vera praktiskt gjørligt at seta seg at samráðast við yvir 100 eigarar.

Um prísin, sum felagið hevur boðið eigarunum í Klaksvík, sigur hann, at tey hava hildið seg til prísir, sum tey kenna aðrastaðnis frá.